## Nýggj EM-síða

Nú EM-endaspælið er byrjað, er eitt av nýggju átøkunum ein nýggj síða, ið er ætlað føroyskum EM-fjepparum. Á síðuni verður gjøgnum alla EM-kappingina skipað fyri kappingum av ymsum slag. Við at tippa um dystirnar eru tey vitjandi við í lutakasti um eitt nú fartelefonir, Nintendo Wii-spælikonsollar og tey so væl kendu EM-klisturmerkini. Tað eru Knassar, sum hava forritað síðuna, og longu fyrsta vikuskiftið vóru á leið 1.000 vitjandi, sum royndu at gita úrslitini av dystunum.




## B68-EB/Streymur í kvøld

Seinasti dysturin í 10. umfarinum av Formula-deildini verður á Svangaskarði í kvøld, har B68 tekur ímóti EB/Streymi. EB/Streymur er undan dystinum oddalið, og teir kunnu økja munin niður til næstu liðini upp í sjey stig, um teir vinna dystin. Nøkur løtt uppgáva verður tað tó ikki, tí B68 hevur havt sera góð úrslit seinastu vikurnar. Og teir kunnu við einum sigri flyta seg upp um miðjuna í deildini.

## Skulu vera betri

Vit fingu orðið á tvífaldaða málskjúttan hjá HB eftir dystin. Vit spurdu Páll M. Joensen, um tað er nøktandi hjá at tapa stig ímóti aftasta liðnum.

- Nei, sjálvandi ikki. Um vit skulu fylgja við EB/Streymi, so mugu vit vera betri til slíkar dystir. Á útivølli á Sandi er ikki nakar lættur dystur, men hetta eru dystir, har vit eiga at vinna, heldur hann.

Hann vil tó einki taka frá B71 og Gudmundi Nielsen.

- Vit eru ein í undirtali, og tað spælir inn. Men vit klára at skora eitt mál í undirtali, og eiga at klára at halda tí. Gudmund skorar tó tvey góð mál og berjist væl við okkara verju. Kreditt til hann, sigur Páll.

Fær EB/Streymur trý stig í kvøld, so liggja teir heili 7 stig á odda. Hann hevur tó framvegis góðar vónir.

- Tað eru framvegis nógv stig at spæla um. Hetta er ikki nøktandi, men vit kunnu koma aftur, og vit hava als ikki givið upp, sigur Páll M. Joensen at enda.

## Fluttu liðið fram

B71-venjarin ljóðaði ikki til at vera ónøgdur, tá ið vit tosaðu við hann eftir dystin. Vit spurdu hann, hvat uppskriftin er til at stjala stig frá HB.

- Tað er ein góður spurningur. Hon er hin sama sum ímóti øllum øðrum. Tað hevur ikki riggað væl á stigatalvuni, og tað er so tað, sum tað er. Við 10 monnum er tað trupult at halda hjá HB, og vit fluttu liðið longri fram á vøllin í seinna hálvleiki, segði Eli Hentze.

B71 hevur í ár havt trupulleikar við at fáa eina góða byrjan á ein dyst, og er sum oftast komið afturúr.

- Tað er langt ímillum góðu løturnar. Spælið blívur krampagtigt og stirvið til tíðir, og tað slepst ikki undan. Vit hava havt trupulleikar við at skora, so tað var gleðiligt at fáa mál, heldur Eli.

- Fyritreytir hava hvørki verið ella eru góðar. Vit hava havt nógv fleiri skaðar og leikbann enn í fjør, men vit royna at fáa nógv burturúr. Kappingin endar ikki í juni, hon endar í oktober, segði Eli Hentze at enda.

B71-HB 2-2 (0-2):

# B71 argaði aftur HB

*B71*

*HB*

**HB hevur ofta havt trupulleikar av B71, og tað høvdu teir eisini í gjár, tá ið teir vitjaðu á Sandi. HB komu væl frá byrjan, men B71 svaraði væl aftur og fekk eitt stig burturúr**

FÓTBÓLTUR

*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Til hvør sítt endamál høvdu bæði liðini tørv á øllum trimum stigunum, tá ið B71 og HB brustu saman á Sandi í gjár. B71 hevur havt eitt heldur misjavnt kappingarár, og lá undan dystinum á aftasta plássi. HB stríðist í hinum endanum, og jagsranin eftir EB/Streymi heldur fram.

Vegna nógvar skaðar í hópinum hevði Eli Hentze sett seg sjálvan á miðvøllin. Eitt sokalla mini-comeback frá ímyndini av fótbólti á Sandi.

### Páll í hopla

Tað hevur verið misjavnt við spælitíð hjá Páli M. Joensen, síðan hann kom aftur úr leygusáttmálanum við NSÍ. Stríðsviljaði áleyparin hevði tó fingið møguleikan heima á Sandi í gjár, og hetta var eftir øllum at døma eitt skilagott væl. Eftir einum korteri fekk HB fríspark stutt uttanfyri brotsteigin, og Páll varð settur at skjótt. Hann sneiddi bóltin í málið ytst út við stongina, og kundi harvið leggja HB á odda 1-0.

B71 hevur í ár havt trupulleikar við at koma væl frá byrjan, og dysturin í gjár var einki undantak. Tað birtist tó ein lítil vón fyri B71, tá ið HB-liðskiparin og miðverjuskansin, Fróði Benjaminsen, eftir hálvum tíma heldur býttisligt og órutinerað fær sær reyða kortið. Hetta hendi eftir eina støðu, har ein B71-ari á einhvønn ólógligan hátt fekk armin í andlitið.

HB dugdi tó væl at leika í undirtali, og stutt fyri hálvleik fingu teir økt um leiðsluna. B71-verjan gav Páli M. Joensen ov góða tíð, og við góðum skotið frá brotsteigarmarkinum fekk ungi áleyparin økt til 2-0. Símun Rógvi Hansen fekk hendurnar á bóltin, men hetta var ikki nóg nógv til at forða hálvleiksstøðuni, sum harvið gjørdist 2-0 til gestirnar.



*HB var á odda 2-0 í steðginum, men sandoyingar fingu kortini strítt seg til javnleik*
*savnsmynd*

### Tvær ferðir Gudmund

B71-liðið kom sum hamskift á vøllin til seinna hálvleik. Teir vóru nú nógv ágrýtnari, og størri vilji sást á liðnum. 2-0 sigst at vera vandamesta leiðsla í fótbólti, og hetta mátti eitt heldur passivt HB-lið ásanna.

Tað vóru ikki gingnir fleiri enn tveir minuttir av seinna hálvleiki, tá ið Gudmund S. Nielsen sleppur leysur mótvegis HB-málinum. U21-landsliðsáleyparin sveik ikki gylta møguleikan, og økti spenningin munandi, meðan hann minkaði til 2-1.

Eftir hetta kom betri lag á heimaáskoðararnar, og B71 trýsti nú fyri at fáa útjavnandi málið. Áskoðararnir skuldu ikki bíða longri enn tiggju minuttir, áðrenn Gudmund aftur gjørdi tey glað. Hann slapp enn einaferð ígjøgnum HB-verjuna og javnaði til 2-2.

B71 trýsti nógv fyri at fáa avgerandi málið, men teimum eydnaðist ikki at skapa lítlu sensatiónina. HB var tó heldur ikki langt frá at fáa mál upp á skjótálop, men hvørki av liðunum fann málið, og dysturin heima á Sandi endaði 2-2. Eitt rættvíst úrslit, tá ið alt kemur til alt.

HB misti eitt týðandi fet í oddastríðnum, og teir eru nú innheintaðir av B36 á 2. plássi. B71 fekk eina stigið við sær, og hetta kann gerast eitt týdningarmikið stig, nú jagstranin eftir at yvirliva í Formuladeildini av álvara fer í gongd.

RINGIÐ TEL 312 000 OG
FÁIÐ EITT OBINDANDI TILBOÐ



CTC-vørumerkið er vælkent hjá føroyingum. Við meira enn 50 árum á føroyska marknaðinum nýtist ikki at siga meira...

Tygum fáa CTC-hitapumpuna hjá Mariu Poulsen.

CTC

Maria Poulsen

Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo | www.mp.fo